# Hittu ráðharrar í Liberia

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, um kvøldið upp í hvassan av suðri. Okkurt ælið, men eisini sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin hvassur vindur ella skrið av landsynningi og sum frálíður regn. Út á seinnapartin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul millum landsynning og landnyrðing og sólglottar, men eisini ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 3 og 7 stig.

**ABC barnahjálp fegnast um, at Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, gjørdi av at vitja verkætlan okkara í Liberia. Saman við uttanríkisráðharranum eydnaðist okkum at hitta forsetan, Ellen Johnson Sirleaf, og seks ráðharrar í liberiansku stjórnini**



*Rúna Sivertsen, forkvinna, Barbara á Tjaldrafløtti, leiðandi serfrøðingur, Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, Joseph Korto, útbúgvingarráðharri, Matthew Sakeuh, leiðari, Hilda Viderø, nevndarlimur og Guðrún Margrét Pálsdóttir, forseti fyri ABC International. Aftanfyri sæst ein av embætisfólkunum í liberianska útbúgvingarmálaráðnum.*

MENNINGARHJÁLP
*Tíðindaskriv*

Á vitjanini í Liberia breyt uttanríkisráðharrin slóð fyri ABC barnahjálp til forsetan og fleiri av ráðharrum hennara. Vit vóru so heppin at hitta bæði Joseph Korto, útbúgvingarráðharra, Walther T. Gwenigale, almanna-og heilsumálaráðharra og Joseph Geebro, undirmálaráðharra í sosialfyrisitingini.

Bæði forsetin og ráðharrarnir vóru øll sera takksom um hjálpina úr Føroyum og gjørdist hetta tí slóðbrótandi fyri arbeiðið hjá ABC barnahjálp í Liberia.

Fundirnir við ráðharrarnar høvdu avgerandi týdning fyri ABC barnahjálp, har vit fingu vissu fyri, at bæði liberianska útbúgvinarmálaráðið og almanna- og heilsumálaráðið vita um og góðkenna verkætlanina. Útbúgvingarmálaráðið í Liberia skal góðkenna bæði lestrarætlanir og lærararnir á skúlanum. Eisini fingu við lyfti um, at sosialfyrisitingin vil hjálpa ABC barnahjálp at finna tey børn, sum veruliga treinjga mest til hjálp, og fer at senda sosialráðgevar til hjálpar hjá ABC Children's Aid.

Nøvnini á teimum ráðharrum, vit hittu á ferðini eru: Johnson N. Gjwaikolo, varauttanríkisráðharri, Joseph Korto, útbúgvingarráðharri, Chris Tore, landbúnaðarráðharri, Miata Beysolow, vinnumálaráðharri, Walther T. Gwenigale, almanna-og heilsumálaráðharri, Joseph Geebro, undirmálaráðharri í almanna- og heilsumálum. Seinast hittu við Ellen Johnson Sirleaf.

Á ferðini fingu vit eisini høvið at hitta Ellen Margrethe Løj, ST ovastan fyri trygd og samskipan.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | -7 |
| Qaqortoq | -5 |
| Ammassalik | -9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | -2 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | -2 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 0 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 14 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | 27 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 962 hPa. vestan fyri Føroyar kemur spakuliga hendavegin og gyrnnist.



**Í dag:**
Lágtrýstið við Føroyar grynnist framvegis. Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing.

Alt um harmonikur



www.simme.eu

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/01 kl. 06[00] – 15/01 06[00]. Hitin í gjár: 3,3°
Minsti hiti máldur í januar: -8,8° - Mesti hiti máldur í januar: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 14/01 kl. 06[00] – 15/01 06[00].
Avfallið higartil í januar: 115 mm




### VESTFALLSKYRRINDI

18. januar Seinna kvarter
23. januar Mánin longst frá jørðini
26. januar Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 20 .jan | 2:11 | 14:35 | 1:11 | 13:35 | 1:26 | 13:50 | 4:11 | 16:35 | 5:11 | 17:35 | 0:26 | 12:50 | 11:50 | - | 2:26 | 14:50 | 3:26 | 15:50 | 1:56 | 14:20 | 3:11 | 15:35 |
| 21 .jan | 2:58 | 15:22 | 1:58 | 14:22 | 2:13 | 14:37 | 4:58 | 17:22 | 5:58 | 18:22 | 1:13 | 13:37 | 0:13 | 12:37 | 3:13 | 15:37 | 4:13 | 16:37 | 2:43 | 15:07 | 3:58 | 16:22 |
| 22 .jan | 3:47 | 16:12 | 2:47 | 15:12 | 3:02 | 15:27 | 5:47 | 18:12 | 6:47 | 19:12 | 2:02 | 14:27 | 1:02 | 13:27 | 4:02 | 16:27 | 5:02 | 17:27 | 3:32 | 15:57 | 4:47 | 17:12 |
| 23 .jan | 4:36 | 17:01 | 3:36 | 16:01 | 3:51 | 16:16 | 6:36 | 19:01 | 7:36 | 20:01 | 2:51 | 15:16 | 1:51 | 14:16 | 4:51 | 17:16 | 5:51 | 18:16 | 4:21 | 16:46 | 5:36 | 18:01 |
| 24 .jan | 5:22 | 17:44 | 4:22 | 16:44 | 4:37 | 16:59 | 7:22 | 19:44 | 8:22 | 20:44 | 3:37 | 15:59 | 2:37 | 14:59 | 5:37 | 17:59 | 6:37 | 18:59 | 5:07 | 17:29 | 6:22 | 18:44 |